# Danir ímóti burka

Hóast teir flestu donsku politikararnir eru ímóti uppskotinum hjá teimum konservativu at banna muslimskum kvinnum at ganga í burka-klæðum á almennum støðum, taka teir flestu donsku veljararnir undir við uppskotinum. Tað vísir ein kanning, sum TV2 hevur latið gera. Har svara 56 prosent av teimum spurdu, at tey taka undir við uppskotinum. Bara 30 prosent siga, at tey eru ímóti. Tað eru serliga veljarar hjá stjórnarflokkinum, Danska Fólkaflokkinum og Sosialdemokratunum, sum taka undir við burka-forboðnum. Veljarar hjá teimum radikalu, SF og Eindarlistanum eru ímóti.



# Eingin almenn royking

Stjórnin í Spania hevur sett sær fyri at banna fólki at roykja á almennum støðum. Heilsumálaráðharrin, Trinidad Jiménez, sigur við fjølmiðlarnar, at stjórnin fær stuðul fólkinum og sipar til meiningakanningar, sum hava víst, at umleið 70 prosent av spanska fólkinum eru fyri einum forboði. Spania fekk eina roykilóg í 2006, og hon bannar fólki at roykja á arbeiðsplássum og í almennum bussum og tokum og avmarkar royking í vertshúsum og á matstovum. Trinidad Jiménez sigur, at lógin frá 2006 hevur vant fólk so mikið, at tíðin er búgvin til at banna royking á øllum almennum støðum.



*Havsbrún hevur í fleiri ár havt umleið 100 ársverk knýtt at síni framleiðslu og sínum virksemi í Fuglafirði. Nú landaða rávørunøgdin er minkað so kolosalt, tí svartkjaftakvotan er vorðin so lítil, er eitt landingarlið minni, og eitt lið minni er á fóðurdeildini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

er landaður til Havsbrún, sum síðan hevur virkað alifóður úr svartkjaftinum. Bæði nótaskipini og Havsbrún hava tjent pening og peningurin, sum Havsbrún hevur tjent, er í stóran mun lagdur aftur í føroyskt vinnulív.

Bergur Poulsen vísir á, at tá alivinnan var í tungum sjógvi, var Havsbrún við til at taka um endan og endurreisa hesa vinnu.

- Í dag er alivinnan aftur ein týðandi partur undir føroyska búskapinum, leggur stjóri á Havsbrún aftrat.

Í roknistykki, sum hann hevur sett upp, kemur Bergur Poulsen eftir, at virðisøkingin, sum svartkjaftfurin skapar, um hann verður veiddur av føroyskum skipum og kemur til sættis í Føroyum, er 315 miljónir krónur um árið.

Hinvegin er virðisøkingin hjá flakatrolarunum eystanfyri, sum veiða tosk, keyptur við føroyskum rávørum, negativ við umleið 42 miljónir krónur um árið, sigur stjórin á Havsbrún.

## Svartkjaftastríð

Hartvig Joensen væntar, at tað verður eitt rættiligt svartkjaftastríð til heystar, tá strandalondini fyrst skulu taka støðu til, hvussu stór samlaða svartkajftakvotan skal verða og síðan, hvat okkara heimligi landsstýrismaður velir at gera við kvotuna.

- Tá samlaða svartkjaftakvotan var størst, var hon 2,2 miljónir tons, harav var okkara partur sum strandaland er 26,13%. Hetta er framvegis okkara prosentpartur, men trupulleikin er bara, at samlaða kvotan í ár einans er 543.000 tons. Hugsandi er, at samlaða kvotan fyri 2010 kanska bert verður 200.000 tons, og tá verður lítið í part – og enn minni at lata til aðrar í býti við eitt nú tosk úr Barentshavinum.

Uttan at fara út í smálutir við við svartkjaftakvotuni, kunnu vit upplýsa, at parturin, sum eftir var til føroysku nótaskipini av svartkjaftakvotuni fyri 2009, einans var 38.000 tons. Aftrat hesum komu so 29.000 tons, sum lógu eftir frá árinum fyri.

- Hetta merkir, at samlaða svartkjaftakvotan hjá føroyskum skipum fyri 2009 einans var 67.000 tons.

Hartvig Joensen vísir á, at føroyski parturin upprunaliga var 141.870 tons av svartkjafti, men av hesum gjørdi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum av at lata russum 100.000 tons av svartkjafti afturfyri tosk í Barentshavinum umframt 12.000 tons av makreli.

- Vit mugu tí bara síggja í eyguni, at verður samlaða svartkjaftakvotan nógv minni komandi ár enn í ár, samstundis sum landsstýrismaðurin framhaldandi letur russum ein so stóran part av kvotuni, verður einki eftir til føroysku skipini – og ei heldur sum rávøra til virksemið hjá okkum, sigur deildarleiðarin á Havsbrún.

## Keypa uttanlands

Fyrimunirnir hjá Havsbrún í Fuglafirði í mun til flestu onnur fóðurvirki um heimin hevur verið, at virkið hevur havt framleiðslu av mjøli og lýsi við síðuna av – ella hurð um hurð – við sjálva fóðurframleiðsluna.

Men við alt ov lítlari rávøru er nú hesin fyrimunur at kalla burtur.

Hartvig Joensen vísir á, at Havsbrún í ár hevur innflutt eini 10.000-15.000 tons av lýsi og eini 5.000-10.000 tons av mjøli fyri at kunna framleiða tað fóður, sum alivinnan hevur brúk fyri.

- Vit hava keypt hesa rávøru frá útbjóðarum í okkara granalondum, leggur hann aftrat.

Meðan Havsbrún í fleiri ár hevur havt stórt avlop á rakstrarsíðuni, sum hevur verið við til at skapt menning á virkinum og eitt nú innan føroysku alivinnuna, er hugsandi, at raksturin verður munandi tyngri í ár, nú neyðugt verður at keypa ein so stóran part av rávøruni uttanlands.

- Vit vóna kortini, at árið í ár fer at geva eitt avlop, tá samanum kemur, sigur deildarleiðarin á fóður-og lýsideildini, Hartvig Joensen.